

Mynd: Álvur Haraldsen

# Spyr um alt á ASK

**RÁÐGEVING** Altjóða Skrivstovan, sum í nøkur ár hevur givið nýklaktu pisunum flog undir veingirnar og hevur beint tey á beina kós í útbúgvingarmálum, hevur nú fingið enn størri leiklut. Higartil hava tey bert ráðgivið um útbúgvingar uttanlands, men nú er ASK einasti stovnurin í landinum, sum ráðgevur um víðari útbúgving, og tí kanst tú spyrja um allar útbúgvingar á ASK

Eydna Skaale

Vilt tú út í heim at lesa? Á Setrið? Gerast lærlingur? Mást tú supplera, fyri at sleppa víðari? Og ivast tú í, júst hvussu tú skalt bera teg at? Spyr so á ASK.

– Fólk eru altíð vælkomin at ringja, maila ella støkka inn á gólvi, um tey hava onkran trupulleika viðvíkjandi víðari lestri. Tað sigur Holger Arnbjerg, sum í fleiri ár hevur beitt ungar føroyingar inn á ta kósina, tey ynskja sær. Hann hevur tí drúgvar royndir eftirhondini og tað, sum hann ikki veit, tað kannar hann.

### Væntaði sesongarbeiði

Holger Arnbjerg greiðir frá, at hann hevði væntað, at arbeiðstrýstið fór at vera serliga stórt beint uppundir donsku freistirnar. Men hann fór skeivur. Orsøkin er, at so nógvir føroyingar ynskja at sleppa longri enn til Danmarkar.

– Freistirnar í ymsu londunu fella ymiskt. Í Danmark er kvota 2 nú í mars, og kvota 1 í summar, men í Avstralia er freistin í august, í Onglandi er hon í januar og í Noregi og Svøríki í apríl. Tað ger, at tað allatíðina er nokk at gera.

Hann greiðir frá, at tað er ymiskt, hvussu góðari tíð fólk eru í.

– Summi koma beint fyri freistina, meðan onnur eru eitt ár fyri tíðina. Og tað kann altíð viðmælast, at fólk eru í góðari tíð. Men hitt letur seg eisini gera, sigur Holger.

Hann leggur dent á, at øll, sum hava ivamál ella spurningar, eru vælkomin inn á gólvið á Altjóða Skrivstovuni.

– Tað er best at gera eina avtalu, ringja ella maila, men fólk kunnu eisini taka kjansin og vita, um eg havi tíð at hjálpa teimum. Eg havi eisini nógvar faldarar og annað tilfar um hægri lestur á skrivstovuni, so tað er bara at leggja leiðina inn á gólvið.

### Góð ráð tá tú spyrt um hjálp

Jú fleiri upplýsingar tú letur, jú lættari er tað at finna júst røttu útbúgvingina til tín.

Greið frá um bakgrundina, hvørjar próvtøkur tú hevur, hvørji próvtøl tú hevur, hvar tú ynskir at sleppa, nær tú vilt undir útbúgvingina og hvat tú vilt.

eydna@sosialurin.fo

### Føroyingar í hægri útbúgvingum - býtt á landafrøðilig øki og skúlaár

| | 2007/08 | | 2008/09 | | 2009/10 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | LESANDI | BÝTIÐ | LESANDI | BÝTIÐ | LESANDI | BÝTIÐ |
| Føroyar | 605 | 39,1% | 701 | 39,3% | 747 | 39,9% |
| Danmark | 791 | 51,1% | 897 | 50,3% | 939 | 50,2% |
| Norðurlond | 37 | 2,4% | 34 | 1,9% | 34 | 1,8% |
| Stórabretland | 94 | 6,1% | 121 | 6,8% | 111 | 5,9% |
| Europa annars | 8 | 0,5% | 10 | 0,6% | 20 | 1,1% |
| Norðuramerika | 8 | 0,5% | 15 | 0,8% | 13 | 0,7% |
| Suðuramerika | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Australia/New Z | 4 | 0,3% | 7 | 0,4% | 7 | 0,4% |
| Miðeystur | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% |
| Asia | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 1 | 0,1% |
| **Í alt** | **1.547** | **100%** | **1.785** | **100%** | **1.872** | **100%** |

*Tølini fyri lesandi í Føroyum eru gjørd við støði í mánaðarliga lestarstuðlinum – øll í hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við. Tølini fyri lesandi uttanlands eru gjørd við støði í ferðastuðlinum – øll í hægri útbúgvingum, ið hava fingið stuðulin í skúlaárinum, eru tald við.* ***Kelda: Studni***

*Talið á føroyingum, ið fara undir hægri lestur økist alsamt. Her sæst eitt býtið av hvar føroyingar lesa. Helvtin av teimum, ið nema sær útbúgving uttanlands, koma ongantíð heim aftur.*

## Hentar heimasíður:

***Kunning til føroyingar, ið ætla sær uttanlands at lesa:***

Altjóða Skrivstovan **www.ask.fo**
Meginfelag Føroyskra Studenta **www.mfs.fo**
Mentamálaráðið **www.mmr.fo**
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark **www.radgevingin.dk**
Yrkisdepilin **www.yrkisdepilin.fo**

**Hvat skal eg lesa:**
Uddannelsesguiden **www.ug.dk**
Karrierevejviser **www.karrierevejviser.dk**

**Pengaviðurskifti:**
Studni **www.studul.fo**
Taks **www.taks.fo**
SU **www.su.dk**
SAAS **www.saas.gov.uk/student_support/special_circumstances/postgrad_list.htm**

**Lestur uttanfyri norðurlond:**
Ucas **www.ucas.co.uk**
Ansa **www.ansa.no**

**Bústaður í Danmark:**
Boligportal **www.boligportal.dk**